## Avmarkaður áhugi

**Hóast fótbóltur er væl dámdur á Cypros, so er tað ikki nakar stórvegis partur av fólkunum, sum gevur landsliðnum gætur**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Nicosia/Cypros:** Tað tykist ikki, sum hevur komandi landsdysturin millum Cypros og Føroyar tann heilt stóra áhugan her niðri á miðjarahavsoynni. Fótbóltur er annars nakað av tí, sum cypriotum dámar best at fara til, tá undirhald stendur á skránni, men tá er hetta mest í felagshøpi.

Á nýggja GSP-leikvøllinum, har landsdysturin skal spælast, er rúm fyri á leið 25.000 fólkum, men leygardagin eru tað væntandi bert eini 3.000 av hesum, sum eru upptikin. Til sammetingar kann nevnast, at talan helst verður um eini 6.000 askoðarar, tá Frakland vitjar mikudagin, meðan tað til toppdystir í bestu lokalu deildini væl og virðiliga er fullsett.

Hetta kemst helst av, at tá umræður landsliðið, so eru cypriotar munandi meira upptiknir av, hvussu gongst hjá Grikkalandi. Leygardagin skal Grikkaland spæla heimadyst móti Ukraina, og roknað verður við, at størsti parturin av tjóðini tá fer at sita við skíggjan, heldur enn at nýta tíðina til at hyggja at dysti millum Cypros og Føroyar.

### Klokkan seks

Tað hevur alla tíðina ljóðað, at landsdysturin leygardagin skuldi spælast klokkan 19.00. Hetta er tó ikki heilt rætt, tí fyri nakað av tíð síðani varð gjørt av, at dysturin skuldi flytast ein klokkutíma. Tað vil við øðrum orðum siga, at dysturin verður leiktur kl. 20.00 lokala tíð. Tað er 18.00 føroyska tíð.

**- jm/áh**

# Stig skulu til

**Føroyski liðskiparin sigur, at føroyska liðið fer eftir í minsta lagi einum stigi, tá farið verður inn á GSP-leikvøllin leygarkvøldið**

CYPROS-FØROYAR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Nicosia, Cypern:** Ikki tí. Tað er vanliga málið hjá okkara monnum at fáa stig burtur úr dystinum, men júst hesaferð eru tað helst fleiri, sum roknað við, at møguleikin er nakað væl størri, enn hann so ofta plagar at vera.

Cypriotiska fótbóltslandsliðið telist nevnliga ikki millum tey sterkastu í heiminum. Kanska er tað heldur tvørturímóti, um hugt verður at styrkismetingini av liðunum, og tí er kanska ikki heilt burtur úr vón og viti, at vónirnar verða settar til stig hesaferð.

Og hesum er føroyski liðskiparin, Óli Johannesen, als ikki ósamdur í.

– Sjálvandi fara vit altíð eftir stigunum, men hesaferð haldi eg, at møguleikin er størri, enn so ofta fyrr. Megna vit at halda organisatiónina á okkara liði, so trúgvi eg veruliga, at vit hava ein møguleika. Tá verður tað trupult hjá teimum at koma til nakrar upplagdar møguleikar, og so er longu helvtin vunnin, heldur Óli.

Óli er annars ein av teimum heilt stóru veteranunum á landsliðnum, og gongst eftir ætlan, so kann hann sum fyrsti leikarin á liðnum fara um teir sjeyti landsdystirnar, tá spælt verður í Írlandi mikudagin.

Hann var eisini partur av liðnum, sum í 1993 tapti fyri Cypros á heima- og útivølli í teirri HM-undankappingini. Men sjálvur heldur Óli ikki, at tann dysturin kann brúkast til nakað í dag.

– Vit hava í øllum førum flutt okkum heilt nógv rætta vegin síðani, men tað hevur Cypros helst eisini, so tað fáa vit ikki nýtt til so øgiliga nógv. Hinvegin tykist leikaralistin hjá teimum ikki serliga ræðandi. Teir hava ein álopsleikara úr bestu griksku deildini, og hann er nokk stóra stjørnan á liðnum, men í aðrar mátar haldi eg, at talan fyri tað mesta er um leikarar úr heimligu deildini, sigur liðskiparin, sum kortini roknat við eini sera truplari uppgávu.

– Tað, sum kann gerast stóri trupulleikin hjá okkum, er spælistílurin hjá teimum. Teir hava nakað av tí sama, sum Jugoslavia hevur, og tað er so ikki nakað, sum hóskar serliga væl til okkum. Teir koyra bóltin runt við fullari ferð, og tí mugu vit ansa eftir, at vit ikki koma at renna sum fluga í fløsku. Tað er eisini tí, at skipanin á okkara liði verður so týdningarmikil, heldur altso Óli Johannesen.



*Hóast føroyska liðið hevur havt stóra framgongd seinnu árini, so heldur Óli Johannesen á ongan hátt, at talan verður um nakran lættan dyst leygardagin*

# Kypriotar hava júst sett botnmet

**Fyri tveimum mánaðum síðani var kypriotiska landsliðið so langt niðri á styrkislistanum hjá FIFA, sum teir ikki hava verið seinastu ellivu árini**

LANDSDYSTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ilt er at meta um kypriotiska landsliðið. Á styrkislistanum hjá FIFA er liðið í løtuni nummar 101, og er næstan tað lægsta, ið Kypros nakrantíð hevur ligið á listanum. Botnmetið settu teir í august mánaði, tá ið teir lógu nummar 104. Hinvegin vóru teir væl hægri uppi á listanum fyri fimm árum síðani, tá ið Kypros lá nummar 58 á styrkislistanum, sum er besta styrkismetingin hjá teimum nakrantíð. Samanbera vit við okkara egna landslið, so liggja Føroyar í løtuni sum nummar 135, meðan besta styrkismetingin, ið vit nakrantíð hava havt, er nummar 104. Botnmetið hjá føroyingum er nummar 139.

### Fingu góða úrtøku í bólkaspælinum til EM

Tá ið spælt varð um at sleppa til EM-endaspælið í Portugal, fekk Kypros heilt góð úrslit, og liðið fekk átta stig. Móti Malta vann Kypros bæði á heimavølli og útivølli 2-1, og tá ið slovenar vitjaðu á Kypros endaði tað við javnleiki 2-2, og ísraelar fingu eisini bara javnleik, 1-1, tá ið teir vitjaðu frítíðaroyggina. Kypros var eisini í bólki saman við Fraklandi tá, og tá ið fraklendingar vitjaðu á Kypros, megnaðu teir akkurát at toga ein 2-1 sigur í land.

Fyrr í ár tók Kypros eisini lut í einari kapping á heimavølli, og tá vunnu teir eitt nú 3-1 á Georgia og 2-1 á Kazakhstan. Í teimum báðum dystunum, sum Kypros hevur spælt í bólki 4 í HM-undankappingini higartil, hevur tað tó ikki eydnast teimum at fáa nakað burturúr.

### Nógvir ungir leikarar á veg

Stór útskifting hevur verið á kypriotiska landsliðnum seinastu árini. Kypros hevur havt eitt sera sterkt U21-landslið síðstu árini, og kypriotiski landsliðsvenjarin, jugoslavin MomciloVukotic, hevur tikið fleiri av ungu monnunum upp á A-landsliðið og givið teimum møguleikan. Hetta hevur fingið øði í onkran av eldru leikarunum, at teir hava verið noyddir til at víkja fyri yngri kreftum. og eitt nú hevur miðvallarin, Michael Chrysostomos úr Apoel FC, trekt seg úr kypriotiska landsliðshópinum, tí at hann er ikki nøgdur við at verða eykamaður.

Tað hevur verið arbeitt dúgliga við heimligu kappingini á Kypros seinnu árini, so at fleiri ungir kypriotiskir leikarar sluppu framat. Fyri okkurt um 10-15 árum síðani var tað ein sera stórur partur av leikarunum í kappingini á Kypros, sum vóru útlendingar, og tað var ógvuliga striltið hjá ungum kypriotum at sleppa framat. Nú hevur so verið arbeitt miðvíst við at menna ungdómsarbeiði, og tað hevur víst seg at geva góð úrslit, tí ein alsamt vaksandi partur av leikarunum í kypriotisku kappingini eru kypriotar.

Teir flestu av leikarunum á landsliðnum hjá Kypros spæla eisini í heimligu kappingini, men nakrir fáir royna seg í grikskum fótbólti hjá so mikið kendum liðum sum Olympiakos, Panathinaikos, AEK Athen og PAOK Saloniki.



# So fer hondbólturin á rull

**Nú um vikuskiftið verður farið undir eitt nýtt kappingarár í hondbólti. Lagt verður til brots sunnudagin hjá bæði monnum og kvinnum**

HONDBÓLTSBYRJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Teir mongu hondbóltsáhugaðu føroyingarnir gleða seg óivað til at sunnudagurin kemur, og farið verður undir eitt nýtt kappingarár. Øll eru tey spent at vita, hvussu teirra lið er fyri, og hvussu vorðið man verða við mótstøðuliðunum.

### Favorittarnir eru teir somu

Um vit skulu royna at gera eina meting av, hvørji lið fara at standa seg best í hesum kappingarárinum, er tað nógv, sum kundi bent á, at tað allarhelst verða somu lið, ið fara at stríðast um heiðursmerkir.

Í fjør var kappingin hjá monnunum óvanliga spennandi, tí at trý lið høvdu møguleikan at gerast meistari á seinasta leikdegi, og avgerðin fall ikki fyrr enn í seinasta sekundi av einum serstakliga spennandi klassikara millum Kyndil og VÍF í Havn.

Júst Kyndil og VÍF fara óivað aftur í ár at liggja frammalaga. Føroyameistararnir úr Kyndli hava at kalla sama fólki sum í fjør, og undir leiðslu av roynda venjaraparinum, Kára Nielsen og Birgir Hansen, sum tóku um endan farna kappingarár, fara teir grønklæddu úr Havn at royna at verja meistaraheitið.

Í Vestmanna er áhugin fyri hondbólti sum altíð stórur. Leikarahópurin hjá vestmenningum er næstan einki broyttur í mun til í fjør. Stóri rumenin, Piti Negru, er farin at spæla við hoyvíkingum, men hann var aldrin nakar stuðulsleikari í VÍF. Fyrstu umførini av landskappingini í ár noyðast vestmenningar tó at verða landsliðsleikaran, Áka G. Olsen, fyriuttan, tí at hann er á brúdleypsferð í USA. Hinvegin venur hin Áki Olsen aftur við fullari megi, eftir at hann varð skaddur ein stóran part av farna kappingarári. Vestmenningar hava í ár ein nýggjan venjara, Dia Midjord, sum í fjør var venjari hjá Neistanum, og sum hevur drúgvar royndir sum venjari.

Eisini Neistin má teljast millum favorittarnar. Í mun til í fjør er ein útlendingur burtur, nevnliga vinstri bakkurin, Dragisa Stojovic, men har er skikkaður avloysari funnin. Neistin hevur nevnliga sett ársins leikara í fjør, Damir Oros, sum leikandi venjara. Oros, ið hevur verið í KÍF í nøkur ár, var eisini toppskjútti í føroysku kappingini seinasta kappingarár. Strikuspælarin Birgir Kass er farin at spæla við hoyvíkingum, og landsliðsleikarin, Heini Hanusarson, er farin aftur til Danmarkar.

### Gamal kenningur í KÍF

Strandingar hava óivað eisini hug til at blanda seg upp í oddastríðið, men hjá StÍF hevur tað stóran týdning, um Sveinur Justinussen verður verandi í Føroyum, ella um hann fer til Danmarkar at spæla. Sveinur kann verða munurin millum ein oddasess og eitt pláss miðskeiðis á stigatalvuni.

H71 hevur aftur í ár danan Henrik Gerster sum venjara, og fólkið hjá hoyvíkingum er á leið tað sama, og sum áðurnevnt eru eitt nú Piti Negru úr VÍF og Birgir Kass úr Neistanum komnir til felagið, so ikki kann sigast annað, enn at tað legst til við stórum fólki í Hoyvík.

Seinasta liðið í 1. deild hjá monnum er KÍF. Kollfirðingar fara óivað at sakna Damir Oros í ár, tí hann hevur havt sera stóran týdning fyri liðið. Í ár verður tað so ein kollfirðingur, ið skal venja KÍF, og tað er eingin annar enn Jóan Pauli Olsen, sum nógvir hondbóltsáhugaðir føroyingar óivað minnast aftur frá fyrr av, tá ið hann spældi við ávíkavist KÍF og VÍF. Jóan Pauli var tiltikin stríðsmaður á vøllinum, og tað verður óivað neyðugt hjá KÍF at finna eitt sindur av hesum stríðsviljanum fram, tá ið farið verður undir landskappingina.

### Átta lið í bestu kvinnudeildini

Í ár verða tað heili átta lið í bestu kvinnudeildini. Í mun til farna kappingarár, tá ið sjey lið vóru, er Tjaldur úr Runavík komið afturat. Men tá ið tað er sagt, kann ikki væntast annað, enn at kappingin fyrst og fremst fer at standa millum tvey lið, nevnliga Stjørnuna og VB, sum eisini vóru argastu kappingarneytar farna kappingarár, tá ið Stjørnan streyk avstað við greipuni framman fyri nøsini á vágskvinnum.

Stjørnan hevur mist onkran profil, men tilgongd hevur eisini verið. Eitt nú hevur Stjørnan fingið fatur á landsliðsmálverjanum, Fríðu Petersen, ið annars altíð hevur spælt við Kyndli.

Í Vági verður saknurin stórur í landsliðsleikaranum, Gurið Mortensen, ið er farin av landinum í útbúgvingarørindum, men hinvegin er nýtt fólk komið til felagið.

Kvinnurnar hjá VÍF hava mist ein týðandi leikara í Nicolinu Eyðbjørnsdóttir, sum er farin at royna eydnuna sum yrkisleikari í Spania. Eisini er onkur onnur fallin frá úr hópinum í mun til í fjør, so tað verður tungt hjá nýggja venjaranum, Sophus Dahl-Christiansen, at fáa vestmannakvinnur upp at bjóða bæði Stjørnuni og VB av.

Neistin hevði í fjør eitt rættuliga gott lið, sum á sínum bestu døgum kundi geva bæði Stjørnuni og VB skarpan gang, og tá ið havt verður í huga, at neistaliðið er rættuliga ungt, er ikki óhugsandi, at tær verða sterkari í ár, nú tær hava fingið eitt sindur meiri royndir.

Tey fýra omanfyri nevndu kvinnuliðini fara helst at mynda ovaru helvt av stigatalvuni, meðan hini fýra Kyndil, StÍF, Tjaldur og Sóljan fara at mynda niðaru helvt.

Tað hevur ljóðað, at liðið hjá Kyndli skuldi fáa styrk, men samstundis hevur felagið mist bæði Fríðu Petersen, Anniku Thomsen og Sabine Frølund. Nýggjur venjari hjá Kyndil er Geir Wardum, so har hevur felagið fingið fatur á einum ordiligum kapasiteti.

Hvussu er statt við fólki í hinum trimum liðunum, vita vit ikki so nógv um enn, men tær næstu vikurnar fara at vísa, hvussu tey ymisku liðini eru fyri, og vit bíða í spenningi.



*Spennandi verður at síggja, hvussu tað fer at ganga hjá ársins leikara í fjør, Damir Oros, nú hann skal royna seg sum leikandi venjara í Neistanum.*

*savnsmynd*

### Dystir um vikuskiftið

**10. oktober 2004**
**Ítróttarhøllin í Vestmanna**:

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 14.30 | VÍF-Stjørnan | 1. deild kvinnur |
| Kl. 16.00 | VÍF-H71 | 1. deild menn |

**Høllin á Hálsi:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 14-30 | Neistin-StÍF | 1. deild kvinnur |
| Kl. 16.00 | Neistin-StÍF | 1. deild menn |

**Hoyvíkshøllin:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 16.00 | KÍF-Kyndil | 1. deild menn |

**VB-høllin**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 15.00 | VB-Kyndil | 1. deild kvinnur |

**Runavík:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 15.00 | Tjaldur-Sóljan | 1. deild kvinnur |